# Alt á einari rokning

**Kall hevur fingið loyvi til at kombinera teirra produktir, soleiðis at alt endar á einari rokning við avsláttri**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Í sambandi við at Kall er farið undir at bjóða fartelefonhald til sínar kundar, hevur fyritøkan samstundis fingið loyvi til at bjóða eitt sokallað "kombi" produkt. Í hesum førinum snýr tað seg um, at fastnethaldið verður knýtt saman við fartelefon, og tú fært alla uppgerðina á einari rokning.

Hjá Kalli fáa kundar við hesari tænastuni so avsláttur upp á haldið til fartelefonina, og avslátturin vekstur alt eftir, hvussu nógv fartelefonhald, ein hevur.

Fjarskiftiseftirlitið hevur ikki viljað givið loyvi til hetta slagið av produktum áður. Hetta er annars væl kent uttanlands, men Fjarskiftiseftirlitið hevur ikki hildið, at marknaður hevur verið klárur til hetta fyrr enn nú.

Føroya Tele hevur eisini roynt at fingið onkra líknandi skipan, men hetta hevur ikki eydnast teimum.




*Kappingin á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum harðnar alsamt. Nýggjasta stigið er at leggja produktir saman, har øll halda nú kunnu fáast á einari rokning. Men hetta kann bert tann eini veitarin bjóða.*
*Mynd: Jens Kristian/Àlvur*

### Øgiliga løgið

Hóast kundar hjá Kall kunnu fegnast um, at teir nú kunnu sleppa eitt sindur bílígari, so er gleðin heldur vorðin til undran hjá Andras Róin, stjóra í Føroya Tele.

– Vit hava nú í tvey ár roynt at fingið loyvi til at veita kombineraðar tænastur, men hetta vorðið avvíst hvørja ferð av Fjarskiftiseftirlitinum, sigur Andras Róin.

Tað eru tríggjar vikur síðani, at Føroya Tele seinast fekk boð frá Fjarskiftiseftirlitinum um, at teir ikki fingu loyvi til at seta teirra produktir saman.

–Hetta er í okkara verð ógvuliga løgið. Vit mugu bara ásanna, at parodiin er fullkomin, sigur Andras Róin.

Grundgevingarnar frá Fjarskiftiseftirlitinum hava áður verið, at kapping ikki hevur verið á øllum økjum, men tá kapping nú er komin, skilur Andras Róin als ikki, at teir ikki kunan fáa loyvi.

– Vit vilja kunnu geva okkara kundum hendan møguleikan. Tað er í síðsta endanum kundarnir, sum missa, sigur Andras Róin.

### Gongur væl

Stjórin fyri Kall, Bjarni Askham Bjarnason, letur væl at gongdini hjá felagnum. Hann metir, at teir nú eiga umleið 10-15% av fartelefonmarknaðinum.

Felagið eigur eisini ein fittan part av fastnetkundunum í Føroyum.

Hann sigur, at gongdi hevur verið góð bæði við Frælsi í dós og við teimum "vanligu" haldunum, sum Kall bjóðaði fram fyri kortum.

Andras Róin sigur, at Føroya Tele hevur merkt kappingina á tann hátt, at framgongdin á teletíðarøkinum er burtur.

– Vit mugu ganga útfrá, at tann framgongdin er farin til Kall, sigur Andras Róin.

Hann heldur, at enn er ov tíðliga at siga, hvørjar .

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Fjarskiftiseftirlitinum.

# Yoko Ono heilsar føroyingum

**Yoko Ono hevur sent fyrireikarunum til Listastevnuna bræv, har hon heitur á føroyingar um at luttaka í stríðnum fyri friði**

FRIÐUR
*Heri á Rógvi*

Tað var ætlanin hjá Listastevnuni at fáa Yoko Ono til Føroya á Listastevnuni við einari framsýning.

Rúmd var ikki á kalendaranum hjá Yoko Ono til Listastevnuna, men hon hevur sent eina heilsan.

Umboðsmaður hennara greiðir frá, at hon ikki hevur møguleika at luttaka á stevnuni, men hon ynskir, at føroyingar luttaka í stríðnum fyri friði.

Í løtuni stendur hon á odda fyri einari kampagnu, sum nevnist Imagine Peace. Annars fæst hon nógv við at taka myndir, og í summar fer hon at hava eina framsýning í Århus, men føroyingur mugu bíða eitt sindur afturat.

Í brævi til fyrireikararnar av Listastevnuni heitir hon á tey um at heingja ein sokallaðan bannara við slagorðunum frá Imagine Peace.

Tað er tó ivasamt um Listastevnan fer at gera hetta, men í øllum førum veit Yoko Ono av, at hon hevur møguleikan at koma til Føroya.



*Yoko Ono kundi ikki koma til Føroya á hesum sinni, men hon vil hava føroyingar at luttaka í stríðnum fyri friði.*

### Beatles

Yoko Ono var flest øll vita gift John Lennon, sum jú var partur av helst mætasta bólkinum nakrantíð, The Beatles. Somuleiðis gjørdi John Lennon vart við seg á egnum beinum, eftir at tíðini við Beatles var liðug. Hann og Yoko Ono gjørdust víðagitin fyri teirra stríð fyri friðið, sum millum annað inni bar teir kendu dagarnar í songinum, har tey framløgdu boðskaðin um frið.

Fyri nógv var John Lennon besti sangskrivarin í tjúgundu øld, og hann gjørdist ein ímynd fyri sína tíð.

John Lennon varð skotin í New York í 1980.

Yoko Ono og John Lennon vórðu gift mitt í Beatles mania tíðini, og hon fekk av mongum skyldina fyri, at limirnir í Beatles fóru hvør til sítt.

Síðani John Lennon doyði hevur Yoko Ono verið javnan frammi, har hon heldur fram við boðskapinum um frið.

# Katja Cardenal

**Songkvinnan Katja Cardenal úr Nikaragua verður við á Listastevnuni í ár**

LISTASTEVNA
*Heri á Rógvi*

Fyrireikingarnar til Listastevnu Føroya eru í fult sving, og skráin er við at verða fastløgd.

Ein av teimum, sum fyri vist verður á skránni er Katja Cardenal, ið er ættað úr afrikanska landinum Nikaragua.

Hon syngur fólkatónleik, og ætlanin er, at hon saman við einum gittarleikara fer at hava eina konsert á Listastevnuni í august í ár.

### Einki Kent

Talan var einaferð um at fáa svenska bólkin Kent til Føroya á Listastevnuna, men hetta sær út til at fara at vera av ongum.

Bólkurin telist millum fremstu bólkar í Norðanlondum í løtuni, og teir hava enn ikki boðað frá, at teir ikki vilja koma til Føroya, men fyrireikararnir av Listastevnuni hava ikki alt ov góðar vónir.






*Nøkunlunda soleiðis fer nýggja Norröna at síggja út, tá hon fer siglandi út úr Havnini*
*Tilgjørd mynd: Árni C. Joensen*

# Styttist til Norröna kemur

**Mánadagin 7. apríl verður nýggja Norröna handað Smyril Line. Tað fer fram á Flenderwerft skipasmiðjuni niðri í Lübeck í Týsklandi. Síðani leggur Norröna leiðina framvið Hanstholm, áðrenn siglt verður upp til Føroya, tá hon verður á Havnini tann 10. apríl**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Nógv hevur verið at hoyrt og tosað um nýggju Norrönu. Og nú styttist av álvara til nýggja ferðamannaskipið fer at leggja at í Havnini. Hósdagur tann 10. apríl er ásettur sum dagur, tá Norröna kemur fyri fyrstu ferð inn á Havnina.

Áðrenn skipið kemur til Føroya verða tað fleiri, sum fara niður til Lübeck at hyggja, meðan Norröna verður handað og pappírini verða undirskrivað.

– Vit hava bjóðað umboðum fyri teimum stóru partaeigarunum í Smyril Line, fjølmiðlafólki og øðrum niður, sigur Kári Durhuus, fjølmiðlatalsmaður hjá Smyril LIne.

Undirskrivingin og handanin verður mánadagin tann 7. apríl. Í Lübeck verður so eitt lítið hátíðarhald við røðum áðrenn Norröna siglir til Hanstholm áðrenn hon setur kós ímóti Føroyum tann 8. apríl.

### Full

Stórur áhugi er eisini fyri nýggja ferðamannaskipinum. Páskatúrarnir sum vera gjørdir beint eftir eru allir fullir, og eisini í útlondunum er áhugin stórur fyri skipinum.

– Vit hava havt nakrar tíðindafundir niðri í Týsklandi, og teir hava verið væl vitjaðir. Eisini í Hollandi hevur áhugin fyri Norrönu verið stórur, sigur Kári Durhuus.

Tíðindafundir hava verið hildnir niðri í Týsklandi í samband við eini stóra ferðavinnustevnu, sum eitur ITB, og á tí eina fundinum vóru heili 45 fjølmiðlafólk uppmøtt, og verður hetta mett at vera ógvuliga gott.

– Tá vit taldu saman funnu vit útav, at bara í februar mánaði hava 73 greinir staðið í týskum bløðum um Norrönu, so áhugin har er ógvuliga stórur.

Ein av orsøkunum til, at Smyril Line hevur avgjørt at marknaðarføra seg á henda hátt niðri í Týsklandi og Hollandi er, at bæði týskarar og hollendarar vísa stóran áhuga fyri at koma niðan í Norðuratlantshavið. Serliga er tað Ísland, sum dregur.

– Tað eru 100 milliónir fólk, sum tosa týskt, so marknaðurin er stórur. Ísland hevur teirra stóra áhuga, og tað at ferðafólkini steðga ein ella tveir dagar í Føroyum er als ikki verri fyri føroyska ferðavinnu, sigur Kári Durhuus.

Hann ásannar tó, at fótbólturin ger eisini stóran mun. Kanska serliga nú Føroyar skulu spæla ímóti Týsklandi í juni.

– Bæði Føroyar, Ísland og Skotland gera tað, at áhugin er stórur. Fótbólturin hevur so ótrúliga nógv at siga, sigur Kári, sum veit at siga frá, at fleiri kenna til Føroyar bara av fótbóltinum. Til dømis tá Føroyar vunnu ímóti Eysturíki fyri 12 árum síðani, og so eisini úrslitið ímóti Týsklandi fyrr í heyst.

Smyril Line hevur fingið fleiri fyrispurningar viðvíkjandi fótbóltsdystunum, men trupulleikin vísir seg tó at vera innivist í Føroyum. Men hetta er ein trupulleiki, sum ferðavinnan í Føroyum arbeiðir hart fyri at loysa í løtuni.

Áhugin fyri Norrönu vísir seg at vera nógv størri enn Kári Durhuss, sum fjølmiðlatalsfólk, hevði vónað.

– Tá tað kemur til PR, so hevur tað eisini nógv at siga, hvar tú ert kendur. Í Danmark kenna tey til Smyril Line, og tað sama í Noregi. Men í Svøríki minni.

### Flagga út

Herfyri varð boðað frá, at um verkfallið hjá Reiðarafelagnum fyri Farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag stendur við, so fer Norröna at flagga út. Tað vil siga, at hon kemur ikki undir føroyskt flagg – í øllum førum ikki enn.

– Sum eg skilji á leiðsluni, so er stórur møguleiki fyri hesum, um verkfallið ikki endar. Møguleikarnir eru nógvir. Tað kann væl vera, at Norröna verður verðandi undir týskum flaggi, tí tað er hon nú skipið verður bygt, sigur fjølmiðlatalsmaðurin.

Nú eru so bara eini 20 dagar til nýggja og stásiliga ferðamannaskipið kemur til Føroya, so nú er ikki nógv annað at gera enn at bíða í spenningi.

## Undirgrundin í Landstinginum

Grønlandska Landstingið viðgjørdi fyrr í vikuni eitt uppskot hjá landstings- og fólkatingsmanninum Kuupik Kleist um at áleggja landsstýrinum at virka fyri, at heimastýrið kann yvirtaka ognarrættin til grønlendsku undirgrundina.

Serliga tinglimir hjá Atassut-flokkinum hildu lítið um uppskotið. Teir vístu á, at landsstýrið arbeiðir longu við málinum, og tí dugdu teir ikki at síggja, at tað hevur sovorðnan skund at avgreiða eitt uppskot um sama mál nú. Eisini vísti Atassut á, at sjálvstýrisnevndin fer at koma við einum áliti nakað skjótt, og at spurningurin um undirgrundina eisini er við í tí álitinum. Tinglimirnir hjá Atassut hildu eisini, at tað er neyðugt at kanna, hvørjar avleiðingar ein møgulig yvirtøka kann fáa, áðrenn støða kann takast til málið.

Uppskotsstillarin heldur harafturímóti ikki, at neyðugt er við drúgvari viðgerð.

- Tað snýr seg ikki bara um rættin til undirgrundina, men eisini um ognarrættin til landið. Eg haldi ikki, at talan er um at skunda nakað uppskot ígjøgnum, tí vit hava tosað um hetta, líka síðani vit høvdu heimastýrisnevndina, sigur Kuupik Kleist, sum heldur, at tað er umráðandi, at grønlendingar siga sína hugsan um undirgrundina.

Uppskotið hjá landstings- og fólkatingsmanninum kemur aftur til viðgerðar í Landstinginum í heystsetuni.

## Navnastríð loyst

Íslendingar, sum búgva í Svøríki, og sum fegnir vilja sleppa at doypa síni børn við teimum vanligu íslendsku eftirnøvnunum, hava havt trupulleikar við at fáa hetta góðkent í Svøríki, men nú er málið loyst.

Svenski ráðharrin í norðurlendskum viðurskiftum, Berit Andnor, sigur, at stjórnin í Stockholm hevur gjørt av at geva íslendskum foreldrum í Svøríki undantaksloyvi frá galdandi navnalóg. Tað ber í sær, at íslendingar, sum búgva í Svøríki, kunnu søkja um loyvi at sleppa at nýta tey vanligu íslendsku eftirnøvnini við -son og -dóttir til børnini.

Málið tók seg upp, tá svensku myndugleikarnir sýttu einum íslendskum foreldrum at nýta íslendskt eftirnavn, tá tey skuldu doypa eitt barn. Foreldrini sendu Norðurlandaráðnum málið, sum sendi tað til stjórnina í Stockholm. Og bnú er málið loyst.

## SV størstur

Sosialistiski Vinstriflokkurin er nú størsti politiski flokkurin í Noregi. Tað vísir ein meiningakanning, sum tíðindatænastan hjá teimum norsku bløðunum almannakunngjørdi í gjár.

Eftir kanningini hevði SV fingið 21,8 prosent av atkvøðunum, var stórtingsval nú. Arbeiðaraflokkurin er tætt í hølunum á SV og hevði fingið 21,6 prosent. Samanborið við eina kanning í síðsta mánað hevur SV havt eina framgongd upp á 3,4 prosentstig, meðan Arbeiðaraflokkurin hevur havt 4,7 prosentstig í afturgongd. Framburðsflokkurin er tann triðstørsti flokkurin við 24,1 prosentum.

Norskir valgranskarar halda, at SV hevur havt stóra framgongd, tí flokkurin hevur tikið avgjørda støðu í fleiri málum, sum eru nógv frammi. Eitt nú hevur flokkurin verið harðliga ímóti amerikanska Irak-politikkinum, eins og hann er avgjørdur í mótstøðuni ímóti norskum limaskapi í ES.